# SKEMT 2000

## fæst í sølubúðunum kring alt landið
## Kostnaður 120,-



**Enn er møguleiki fyri at ogna sær allar 12 SKEMT bøkurnar í signeraðum eintøkum fyri ein samlaðan prís á einans kr. 650,-**

**Bíleggið nú og tit fáa tær sendandi beinanvegin. Ringið til Sosialin á tlf. 31 18 20**

Sosialurin - 311820




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2594, **P/F Salmex, 410 Kollafjørður.**

**Viðtøkur broyttar:** 11.09.2000.
**Nevnd:** Farin úr nevndini: Eyðbjørg Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn og Ida Berg, Peder Andersensvej 1, DK-9850 Hirtshals. Innkomin í nevndina: Gudmund Strømnes, N-6900 Florø og Bjarte Tunholt, 7 Oak Court Waydon Hill Road, GU 9 8 Fanham UK.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra saman við einum nevndarlimi, ella av einum nevndarlimi.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka aling, eiga partabrøv í øðrum feløgum, framleiðsla, handil og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 9. januar 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2593, **P/F Bláfosslaks, 410 Kollafjørður.**
**Viðtøkur broyttar:** 11.09.2000.
**Nevnd:** Farin úr nevndini: Eyðbjørg Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn og Ida Berg, Peder Andersensvej 1, DK-9850 Hirtshals. Innkomin í nevndina: Gudmund Strømnes, N-6900 Florø og Bjarte Tunholt, 7 Oak Court Waydon Hill Road, GU 9 8 Fanham UK.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra saman við einum nevndarlimi, ella av einum nevndarlimi.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka aling, eiga partabrøv í øðrum feløgum, framleiðsla, handil og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 9. januar 2001

Kristin Balle

---

# Skrivari til LISA - Listafólkasamband Føroya

Søkt verður eftir skrivara til skrivstovuna hjá LISA at byrja tann 1. mars 2001. Skrivstovan er upplýsingarmiðstøð fyri limafeløg og myndugleikar og skrivarin skal hava dagliga virksemið um hond.

Virksemið fevnir millum annað um:
- at leggja til rættis starvsnevndarfundir og fundir í umboðsráðnum,
- at samskifta við felagsskapir og myndugleikar, sum LISA samstarvar við,
- at fylgja øllum málum upp, sum starvsnevndin og umboðsráðið hava samtykt.

Starvið er við niðursettari tíð og treytað av játtan frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Maluna Johannesen á skrivstovuni hjá LISA telefon 320197.

Umsóknir skulu sendast til: LISA, postrúm 324, FO-110 Tórshavn í seinasta lagi 22. januar 2001.

---

***NORÐÍS Seafood P/F***

# Framleiðsluleiðari

Til flakavirkið hjá NORÐÍS Seafood P/F á Eiði, verður við hesum sókt eftir framleiðsluleiðara.

**Starvið**
umfatar dagliga ábyrgd av framleiðsluni á virkinum eftir nærri ásetan av virkisleiðsluni, herundir at fáa til vega alt tilfar sum verður nýtt í og til framleiðsluni.
Eisini hevur framleiðsluleiðarin ábyrgd av fremjanini av Innaneftirlitinum á virkinum.

**Kravt verður**
at Framleiðsluleiðarin er arbeiðsamur, nærlagdur og er førur fyri í stóran mun at arbeiða og taka avgerðir sjálvstøðugt.

**Setanin**
verður framd skjótast gjørligt og verður løn og treytir ásett eftir eftir nærri avtalu.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til virkið og spyrja eftir Jóhan Páll ella Petur.

**Umsókn**
saman við viðkomandi skjølum og viðmælum kann sendast til:

**NORÐÍS Seafood P/F**
470 Eiði

*NORÐÍS Seafood P/F eigur og rekur flakavirkið á Eiði. Árliga tekur virkið ímóti umleið 2.500 tonsum av ráfiski. Á virkinum eru umleið 45 ársverk.*

**NORÐÍS Seafood P/F, Tlf 423583 – Fax 423584**

---

**LØGMANSSKRIVSTOVAN**

# Fulltrúi/løgfrøðingur

Við hesum verður eitt starv sum løgfrøðingur á Løgmansskrivstovuni lýst leys at søkja.

**Uppgávur**
Arbeiðsuppgávurnar er fjølbroytt løgfrøðiligt arbeiði so sum gerð av løgfrøðiligum responsa, eftirkanning av lógaruppskotum hjá miðfyrisitingini og aðrar løgfrøðiligar uppgávur, eitt nú menning og samskipan av lóggávuarbeiðinum í miðfyrisitingini, og løgfrøðiligar arbeiðsuppgávur, ið standast av málinum um ríkisrættarligu støðu Føroya.

**Faklig førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjarar hava løgfrøðiligt embætisprógv. Tó kunnu eisini tey søkja, ið vantandi verða liðug við slíka útbúgving komandi summar.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar skulu harumframt hava góðan kunnleika til føroyskt mál.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya. Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna við tilhoyrandi stovnum og aðalstýrini.

**Vit kunnu bjóða**
Talan er um eitt fakliga krevjandi starv við nógvum avbjóðingum og við sera góðum møguleikum fyri eftirútbúgving.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar eru vælkomnir at seta seg í samband við Rúna Joensen, deildarstjóra, tlf. 351010, fyri at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

Løgmansskrivstovuni
Postsmogu 64
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera á Løgmansskrivstovuni í seinasta lagi 26. januar 2001 kl. 16.00. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Løgmansskrivstovan er fyrisiting hjá løgmanni og varaløgmanni. Løgmansskrivstovan er skipað í tríggjar deildir og tvær tænastueindir og hevur í høvuðsheitum tvørvegis og samskipandi uppgávur, eitt nú landstýrisfundir, uttanlandsmál, umboðan, starvsfólkapolitikk, fyrisiting, nýskipan og sjálvstýrismál.

---

# Handilsinnbúgv til sølu

Kølara, frystara, kassadiskur, hillar, ljósarmatur. o.a.

**Tlf. 214005**

---

Original bosal Útstoyt



**p/f Esmar Simonsen**
**Kambsdalur**
**FR-530 Fuglafjørður**
**Tlf. 444405**
**Fax444629**

---

Søkt verður eftir

# Dagrøktarleiðara

til dagrøktarskipanina í Sandavágs Kommunu.

Til starvið krevst námsfrøðilig útbúgving.

Umsóknir til starvið skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 22. januar 2001.

**Sandavágs Kommuna**

Sosialurin